## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av landsynningi og vátakavi ella regn. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og eystri og regn av og á. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landnyrðingi og regn fyrrapartin, men seinnapartin yvirhøvur turt. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar, Sunnudagin veksur hann vindin av útsynningi og regn. Hitin millum 3 og 7 stig.

# Kent verk á føroyskum

**Í gjár kom út bókin "Bøðilin", sum Eilif Samuelsen hevur týtt til føroyskt. Hetta er onnur bókin, sum hann týðir eftir kenda svenska rithøvundin Pär Lagerkvist í ár**

Bøkur
Snorri Brend

Í vár gav Forlagið HEMLIÐ út skaldsøguna BARABBAS eftir Pär Lagerkvist.

Nú gevur Forlagið út enn eina av kendastu bókunum hjá Pär Lagerkvist í føroyskari týðing. Hesa ferð er tað BØÐILIN, sum vakti stóran ans, tá ið bókin kom út í 1933 og ikki minst eftir kríggið, tá ið sannleikin í innihaldinum kundi verða váttaður.

BØÐILIN er ein long stuttsøga ella ein stutt skaldsøga. Høvundurin er ávirkaður av tí einræðisalduni og fasismuni, sum tók seg upp í Europa í árunum undan 2. heimsbardaga.

BØÐILIN er søgan um tann tíðarleysa óndskapin og fordømir hóttanina frá einaræðisharrunum og fasismuni. Fyrsti parturin er lagdur til ein miðaldar bý, har lesarin hittir bøðilin, sum síðani verður fluttur upp í nútíðina og ongantíð missir sína innastu veru sum tann holdgjørdi óndskapurin. Hann er fordømdur í ævigar tíðir fyri syndirnar hjá mannaættini. Moralskir spurningar og tann humanistiska kreppan settu sín dám á skaldskapin hjá Lagerkvist í 1930 og 1940árunum.

Bókin sum er 87 blaðsíður kostar 198 kr. Bókin fæst til keyps í bókabúðunum og á heimasíðuni hjá Forlagnum HEMLIÐ (www.hemlid.fo).

Forlagið varð stovnað á vári 2004 og útgav fyrstu bókina sama árið. Endamálið er at geva út heimsklassikarar á føroyskum máli.




*Bøðilin skrivaði Pär Lagerkvist longu í 1933, árið tá ið Hitler tók við valdinum. Íblásturin var ein ferð gjøgnum Týskland. Einki norðurlendskt skald hevur megnað at givið okkum ein sterkari varhuga av tátíðar yvirtrúgv og bonskleika, og meira óhugnaliga veruleikasatt hevur eingin frammanundan sæð teir ræðuleikar, sum fóru at koma. Javnberingin tekur kvørkratak á lesaran*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -11 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -4 |
| Ammassalik | -5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 11 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 8 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 8 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 3 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 2 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 14 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 11 |
| New Dehli | 23 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 6 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 27 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 34 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1018 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum kemur hendavegin og viknar.



**Í dag:**
Ein hátrýstryggur vestan fyri Føroyar verður yvir Føroyum mikudagin. Lágtrýstið við Hvarvið fer eystureftir og brúgvalgið haðani nærkast Føroyum hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 01/12 kl. 06[00] – 02/12 06[00]. Hitin í gjár: °
Minsti hiti máldur í deember: -10,5° - Mesti hiti máldur í november: °

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 01/12 kl. 06[00] – 02/12 06[00].
Avfallið higartil í desember: 0 mm

Alt um harmonikur



www.simme.eu




## VESTFALLSKYRRINDI

27. november Tendring
29. november Mánin longst frá jørðini
5. desember Fyrra kvarter
12. desember Fullmáni/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. des | 9:50 | 22:10 | 8:50 | 21:10 | 9:05 | 21:25 | 11:50 | - | 0:30 | 12:50 | 8:05 | 20:25 | 7:05 | 19:25 | 10:05 | 22:25 | 11:05 | 23:25 | 9:35 | 21:55 | 10:50 | 23:10 |
| 3. des | 10:29 | 22:49 | 9:29 | 21:49 | 9:44 | 22:04 | 0:10 | 12:29 | 1:10 | 13:29 | 8:44 | 21:04 | 7:44 | 20:04 | 10:44 | 23:04 | 11:44 | - | 10:14 | 22:34 | 11:29 | 23:49 |
| 4. des | 11:07 | 23:26 | 10:07 | 22:26 | 10:22 | 22:41 | 0:49 | 13:07 | 1:49 | 14:07 | 9:22 | 21:41 | 8:22 | 20:41 | 11:22 | 23:41 | 0:04 | 12:22 | 10:52 | 23:11 | - | 12:07 |
| 5. des | 11:59 | - | 10:59 | 23:31 | 11:14 | 23:46 | 1:26 | 13:59 | 2:26 | 14:59 | 10:14 | 22:46 | 9:14 | 21:46 | - | 12:14 | 0:41 | 13:14 | 11:44 | - | 0:26 | 12:59 |
| 6. des | 0:31 | 13:03 | - | 12:03 | - | 12:18 | 2:31 | 15:03 | 3:31 | 16:03 | 11:18 | 23:51 | 10:18 | 22:51 | 0:46 | 13:18 | 1:46 | 14:18 | 0:16 | 12:48 | 1:31 | 14:03 |